STARVSLÝSING









# Vit hava brúk fyri tær





**Støv í teknisku fyrisiting**

Vit bjóða tær eitt spennandi, avbjóðandi og fjølbroytt starv við nógvum menningarmøguleikum og góðum trivnaði. Í sambandi við bygnarðarbroytingarnar hava vit brúk fyri:

**Deildarleiðarum** til Býarskipanardeildina, Byggideildina, Plan- og rakstrardeildina og Náttúru- og umhvørvisdeildina. Arbeiðið fevnir m.a. um dagliga leiðslu og at stýra fíggjarætlan, vera við í bygginevndum og arbeiðsbólkum, hava eftirlit við kommunalum byggiarbeiði og projekteringsuppgávum.

**Verkfrøðingi** til Byggideildina. Arbeiðið fevnir m.a. um byggimálsviðgerð, útstykkingarætlanir, projektering og byggieftirlit.

**Byggifrøðingum** til Byggideildina og Plan- og rakstrardeildina. Arbeiðið á Byggideildini fevnir m.a. um byggimálsviðgerð, útstykkingarætlanir, projektering og byggieftirlit. Arbeiði á Plan- og rakstrardeildini fevnir m.a. um planlegging, ferðsluplanlegging, smærri verkætlanir og umsiting av ymsum rakstraruppgávum.

**Samskipara** at enduskoða byggisamtyktir v.m. Arbeiðið fevnir m.a. um at endurskoða byggisamtyktir, gera nýggjar byggisamtyktir, ráðgeva, samskifta við landsmyndugleikar, kommunalar felagsskapir og grannalond.

**Málsviðgerðum** til Byggideildina og til Plan- og rakstrardeildina. Arbeiðið á Byggideildini fevnir um m.a. byggimálsviðgerð, útstykkingarætlanir, projektering og byggieftirlit. Arbeiðið á Plan- og rakstrardeildini verður at umsita bussleiðina og skúlabarnakoyringina.

**Tekniskum starvsfólkum** til Lendisdeildina. Talan er um tvey leys størv. Arbeiðið verður at dagføra og menna digitalu kortskipanina (FDS-skipanina), og tænastuveitingar til aðrar deildir.

**Umsóknarfreistin** til øll størvini er mánadagin 23. juni 2008.

**Lesið meira um arbeiðsuppgávur, møguleikar, krøv og setanarviðurskifti á www.torshavn.fo ella send teldupost til torshavn@torshavn.fo. Merk teldupostin "Starv í teknisku fyrisiting".**

**Tórshavnar kommuna**